INNLEIÐANDI ELEKTRONIKKUR

Starvsstovuvenjingar

Magnus Danielsen



NVD*Rit* 2005:13

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

Heiti / Title **Innleiðandi Elektronikkur**
Starvstovuvenjingar

Høvundur / Author Magnus Danielsen

Ritslag / Report Type *Undirvísingartilfar/Teaching Material*

NVD*Rit* 2005:13

ISSN 1601-9741
Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
✆ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

INNIHALDSYVIRLIT

Fororð:
Hesar síður eru leiðbeiningar til starvsstovuvenjingar í lærugreinini ”digitalur elektronikkur”, ið er innleiðandi elektronikklærugrein í lestri til BSc í ravmagnsverkfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

I. OPERATIÓNSSTYRKJARAR
STARVSTOVUVENJING

Inngangur
Í venjingini verður ein operatiónsstyrkjari settur upp í eina streymrás og royndur í tveimum ymiskum uppsetingum:

– Í fyrru uppsetingini virkar hann sum ein einfaldur styrkjari
– Í seinnu uppsetingini virkar hann sum ein summatiónsrás og leggur fleiri spenningar saman.

Uppsetingarnar skulu roynast bæði við telduforritinum PSpice og í eini uppseting av elektronisku lutunum í starvsstovuni.

Tað er týdningarmikið at fyrireika seg væl og, at **allir teir teoretisku spurningarnir eru svaraðir, áðrenn møtt verður í starvsstovuni**. Tíðin í starvsstovuni er bert 2 tímar. Stutt frágreiðing um venjingina skal verða skrivað.

1. Einfaldur styrkjari
Í myndini er ein operatiónsstyrkjarauppseting víst.



Mynd 1

$R_1 = 0{,}5\ k\Omega$
Forsýningsspenningarnir, ið nýttir verða, eru +10 volt og –10 volt

Spurningar at svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni:
1.1. Hvussu stórur skal R_0 vera fyri, at styrkingin A=V/E skal hava virðið –10 ?
1.2. Hvussu stór eru approksimativu metningsvirðini á útgangsspenninginum V?

Spurningar at svara við brúk av teldusimuleringsforritinum PSpice:
1.3. Ger eina uppseting av operatiónsstyrkjaranum í telduni við funnað virðinum fyri R_0 og prenta tekningina (diagrammið) til at seta í frágreiðingina.
1.4. Ger eina simulering av útgangsspenninginum sum funktión av inngangsspenninginum við –15 volt < E < +15 volt. Prenta myndina til at skjalfesta úrslitið.
1.5. Hvussu stór er styrkingin í linjurætta økinum?
1.6. Hvat virði hava metningsvirðini á útgangsspenninginum?

Spurningar at svara í starvsstovuni:
1.7. Ger eina uppseting av styrkjaranum og eina tekning (diagramm) av uppsetingini.
1.8. Máta útgangsspenningin sum funktión av inngangsspenninginum –15 volt < E < +15 volt.
1.9. Hvussu stór er styrkingin í linjurætta økinum?
1.10. Hvat stødd hava metningsvirðini á útgangsspenninginum?

2. Summatións rás



Mynd 2

Set virðini á inngangsspenningunum til
E_1 = 2 volt
E_2 = 3 volt

Set $R_0 = R_1 = R_2 = 1$ kΩ

Spurningar at svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni:

2.1. Rokna virði á útgangsspenninginum V

Spurningar at svara við brúk av teldusimuleringsforritinum PSpice:

2.2. Ger eina uppseting av summatiónsrásini á telduni, prenta tekningina til at seta í frágreiðingina.
2.3. Ger eina simulering av rásini og avger virðið á útgangsspenninginum V.
2.4. Hvussu stórur er feilurin í %.

Spurningar at svara í starvsstovuni:

2.5. Ger eina uppseting av styrkjaranum og eina tekning (diagramm) av uppsetingini.
2.6. Máta útgangsspenningin sum funktión av inngangsspenninginum
2.7. Hvussu stórur er feilurin í %.
2.8. Hvussu kanst tú útbyggja uppsetingina soleiðis, at forteknið á V verður rætt í einari summatiónsprosess. Set uppsetingina upp og royn hana, um tíðin loyvir tí.

II. RC - RÁS
STARVSTOVUVENJING

Inngangur
Venjingin skal vísa, hvussu ein kondensator í eini streymrás, sum annars bert inniheldur spenningsgerða og mótstøður, háttar sær.

Í venjingini verður ein kondensator settur upp í eina streymrás og royndur í tveimum ymiskum førum:
- Í fyrra føri verður spennigsgerði, ið kann skifta millum tvey spenningsvirði settur til, og spenningurin yvir kondensatorin, og streymurin gjøgnum eina av mótstøðunum í rásini verður mátaður.
- Í seinna føri verður pulsgerði við føstum formi gjørdur, har trin-spenningur frá spenningsgerða er brúktur til at avgera, nær ein fýrkantaður spenningspulsur verður gjørdur. Hetta verður gjørt við hjálp av kombinatoriskari streymrás, har umframt IC rásir eisini mótstøða og kondensator innganga til at avgera pulslongdina. Skiftið millum lágan og høgan útgangsspenning er ikki skarpt við vanligum IC komponentum. Tí er betur, at IC rásir við Schmitt triggara inngangi verða nýttir.

Uppsetingarnar skulu roynast bæði við telduforritinum PSpice og í eini uppseting av elektronisku lutunum í starvsstovuni.

Tað er týdningarmikið at fyrireika seg væl og, at **allir teoretisku spurningarnir eru svaraðir, áðrenn møtt verður í starvsstovuni**. Tíðin í starvsstovuni er bert 2 tímar. Stutt frágreiðing um venjingina skal verða skrivað.

1. RC-rás við fýrkants spenningsgerða
Í myndini er ein RC-rás vist. E er spenningsgerði, ið gevur ein periodiskan fýrkantspenning frá sær

$$E = \begin{cases} 5V & 0 \le t < \dfrac{T}{2} \\ 0V & \dfrac{T}{2} \le t < T \end{cases}$$

har periodan $T >> \tau$, ið er tíðarkonstanturin fyri rásina. Hetta merkir, at spenningar og streymar kunnu verða útroknaðir frá treytini, at E er ein trinspenningur.



Spurningar at svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni:

1.1. Rokna virðið á tíðarkonstantinum τ.

1.2. Finn virðið á $V_C(0_-)$, $V_C(0_+)$ og $V_C(\infty)$ umframt $I(0_-)$, $I(0_+)$ og $I(\infty)$ í tí føri, at E skiftir frá 0V til 5V.

1.3. Tekna $V_C(t)$ og I(t) sum funktión av tíðini t.
1.4. Svara spurningunum 1.1 til 1.3 í tí føri, at E skiftir frá 5V til 0V.

Spurningar at svara við brúk av teldusimuleringsforritinum PSPICE:

1.5. Ger eina uppseting av rásini í telduni við givnum mótstøðum og kondensatorvirði, og har T=5ms.
1.6. Ger simulering av $V_C(t)$ og I(t).

Spurningar at svara í starvsstovuni:

1.7. Ger eina uppseting av RC-rásini og eina tekning (diagramm) av uppsetingini. (Ansa eftir, at spenningsgerðin hevur eina innaru mótstøðu, sum skal vera partur av mótstøðuni R_1 soleiðis, at samlaða mótstøðan R_1 = 1 kΩ)
1.8. Máta spenningin $V_C(t)$ og streymin I(t) sum funktión av tíðini t við einum oscilloscopi. I(t) kann verða mátaður t.d. við at máta spenningin yvir R_2 (verður mátaður við at máta potentialið á báðum endum á R_2 við tveimum kanalum á oscilloscopinum og draga frá).
1.9. Samanber við tey útroknaðu og simuleraðu úrslitini.

2. RC-rás til gerð av pulsgerða, ið gevur puls við føstum formi.

Í streymrásini í mynd 2 er V1 ein pulsspenningsgerði, sum gevur invertaranum U1A ein spenning, sum broytist frá V1 = 0 volt til V1 = 4 volt. Útgangurin V2 broytist tá tilsvarandi frá o.u. 4 V til 0 V. U2A, sum er ein NAND gate, fær annan inngangsspenningin beinleiðis frá V1, og hin spenningin V_2' umvegis R1 og C1 frá V2. Útgangurin V3 verður so inverteraður í invertaranum U3A soleiðis, at endaligi útgangsspenningurin V4 gevur tann ynskta pulsin. Her er U3A, sum í veruleikanum er ein NAND-gate, brúktur sum invertari við at samankobla inngangirnar (vís hví hann virkar so!).

Tað eigur at verða lagt merki til, at NAND-gaturnar av slagnum 74132 hava Schmitt triggara í innganginum til tess at fáa ein meira fullkomnan fýrkantpuls á útganginum. Aðrar NAND-gatur eru eisini, t.d. 7400, ið ongan Schmitt triggara hava, men verða ikki brúktar her.



Mynd 2

Spurningar at svara heima

2.1. Ger frágreiðing um, hvussu rásin virkar við t.d. at skitsera V_1, V_2, V_2', V_3 og V_4.
2.2. Rokna virðið á tíðarkonstantinum τ.
2.3. Finn virði á V'(0_-), V'(0_+) og V'(∞), og formulin fyri V'(t). Ger tekning av V'(t).

Invertarin U1A verður her í teoretisku útrokningunum roknaður at hava útgangsvirðini o.u. 3,8 volt í høgari støðu, og 0,2 volt í lágari støðu. Tilsvarandi er lágur skiftispenningur á inngnginum á U2A 0,8 volt, og høgur skiftispenningur 2,4 volt.

2.4. Rokna út breiddina á fýrkantspulsinum á útganginum. (Set skifti inngangsspenningin í U2A til 0,8 V.)

Spurningar at svara við PSPICE

2.5. Ger eina uppseting av rásini við simuleringsforritinum í telduni við teimum givnu mótstøðunum og kondensatorinum. Prenta rásina.
2.6. Ger simulering av V1, V2, V2', V3 og V4 sum funktión av tíðini.

Spurningar at svara í starvsstovuni:

2.7. Ger eina uppseting av RC-rásini og eina tekning (diagramm) av uppsetingini.
2.8. Máta spenningarnar V1, V2, V2', V3 og V4 sum funktión av tíðini við oscilloscopinum. Ger tekning av hesum og finn pulsbreiddina á V4.
2.9. Samanber við tær útroknaðu og simuleraðu úrslitini
2.10. Hví gevur Schmitt triggarin ein meira fulkomnan puls á útganginum?

III. EINFALT DIGITALVOLTMETUR
STARVSTOVUVENJING

1. Inngangur
Í venjingini verða prinsippini fyri uppbygging og virkihátti av einum digitalvoltmetri kannað og greind. Digitalvoltmetrið er uppbygt av undireindum. *Týdningarmikið er, at hvør eindin sær fyrst verður uppbygd, kannað og skjalprógvað.* Síðan verða tær bundnar saman til eina samanhangandi skipan, ið myndar tað samlaða digitalvoltmetr-ið. Tað er ikki skilagott og verður rátt frá at seta alla uppsetingina upp beinanvegin uttan at kanna hvørja undireind sær. Yvirlitið yvir rásina verður lættari mist við at gera tað.

2. Einføld digitalvoltmeturskipan.
Digitalvoltmetrið er ein skipan, ið mátar ein spenning og umger mátiúrslitið til eitt tal, sum í hesi roynd er eitt binert tal við 8 bittum. Hátturin, digitalvoltmetrið virkar uppá er í stuttum hesin. Ein stýristreymrás (stýriskipan) fær ein elektroniskan bineran teljara at telja upp til eitt talvirði, sum svarar til tann spenningin V_X, ið vit skulu máta. Tann bineri 8 bit teljarin telur klokkusignalpulsar frá nul og upp til eitt tal, har hann verður steðgaður av einum signali frá komparatorinum. Komparatorin ger sítt



Mynd 2.1 Yvirlitsrás.

útgangssignal við at samanbera spenningin V_X við eitt analogt spenningssignal V, sum D/A umsetarin ger burtur úr digitala útgangssignalinum frá teljaranum. Tá hetta spenningssignalið V fer upp um V_X skal komparatorin steðga binera teljaranum. Teljara-virðið, ið bineri teljarin tá hevur talt upp til, er eitt digitalt mát fyri spenninginum V_X.

Tað digitala voltmetrið verður stýrt av eini stýriskipan til at vera í einum av trimum ymiskum støðum:

Støða 1: voltmetrið er nullstillað
Støða 2: voltmetrið mátar ein spenning
Støða 3: voltmetrið verður roynt, um tað er ført fyri at máta upp til fullan spenning, og um "displayið" (her ljósdiodur) er í lagi.

Stýriskipanin fær eitt digitalt signal svarandi til hesar støður frá einum teljara, ið kann telja upp til 3 (trýteljara). Trýteljarin verður hin vegin stillaður við einum trýst-umskiftara, ið gevur honum hondstýrdar spenningspulsar sum inngangssignal.

Fyrsta trýst gevur 1. støðu, annað trýst gevur 2. støðu, og triðja trýst gevur 3.støðu, og o verður byrjað av nýggjum. Umframt signalið frá trýteljaranum, fær kontrolskipanin eisini eitt signal frá útganginum av binera teljaranum.Hetta signalið sigur frá, nær bineri teljarin hevur talt upp til maksimum.

Tað er endamálið við hesi venjing at byggja upp tær ymsu lutskipaninar hvør sær og royna tær. Síðan skulu tær bindast saman til eitt samlað digitalvoltmetur, ið her hevur binera útlesing til 8 ljósdiodur sum detektorar, eina til hvørt einstakt bit.
Venjingin er skipað í:

1. ein fyrireikingarpart, ið snýr seg um at seta seg inn í tað neyðturvuliga lærubókatilfarið til at kunna skilja og loysa spurningarnar í hesi venjingini (er umfatað av tí sum higartil er gjøgnumgingið),
2. nakrar teoretiskar spurningar í samband við uppbygging av skipanini og *skulu verða svaraðir áðrenn, møtt verður upp í starvsstovuni,*
3. sjálva starvsstovuvenjingina, sum snýr seg um at uppbyggja skipanina, fáa hana at virka, gera neyðugar mátingar og avlesingar. *Hvør lutskipan sær skal uppbyggjast, roynast og skjalprógvast áðrenn, tær verða bundnar saman til eina heildarskipan.*
4. og dokumentera bæði uppbygging og úrslit, og skriva eina samanhangandi frágreiðing um úrslitini.

Viðmerking: tak ikki lutskipaninar sundur aftur beinanvegin, tá tær eru royndar. Tær skulu, tá tær allar eru fingnar at virka, bindast saman í eina samlaða digitalvoltmetur-skipan.

2.1 3-teljari til funktiónsskiftara. Teljisekvensur 00 01 10 00 .....

Tveir MS-JK flip-flop, báðir integreraðir í ein "chip" 74LS76 , hvørs datablað uppgevur sannleikatalvuna í mynd 2.1.1, verða brúktir til henda 3-teljaran. Tveir flip-flop'ar kunnu, tá teir eru hóskandi bundnir saman telja til í mesta lagi $2^2 = 4$ ymsar støður. Í hesi royndini eru bert 3 støður ynsktar, har Q-útgangirnir hava virðini 00 01 10, meðan 11 ikki skal fyrikoma.


DUAL J-K FLIP-FLOPS WITH PRESET AND CLEAR

76

'LS76A

FUNCTION TABLE

INPUTS					OUTPUTS	
PRESET	CLEAR	CLOCK	J	K	Q	$\bar{Q}$
L	H	X	X	X	H	L
H	L	X	X	X	L	H
L	L	X	X	X	H*	H*
H	H	↓	L	L	Q_0	$\bar{Q}_0$
H	H	↓	H	L	H	L
H	H	↓	L	H	L	H
H	H	↓	H	H	TOGGLE	
H	H	H	X	X	Q_0	$\bar{Q}_0$

SN5476 (J, W) SN7476 (J, N)
SN54H76 (J, W) SN74H76 (J, N)
SN54LS76A (J, W) SN74LS76A (J, N)

Mynd 2.1.1 MS-JK flip-flop 74LS76, partur av datablaði.

At svara, áðrenn møtt verður í starvstovuni:
Spurningur 1: Konstruera umvendu sannleikatalvuna, talva 1, hjá eini MS-JK flip-flop rás við at seta "0", "1" og "don't care" støður í talvuna.

Spurningur 2: Útfyll talvuna 2 og tíðarfarmyndina mynd 2.1.3.

Spurningur 3: Tekna á hesum grundarlagi eina streymrás (diagramm) fyri 3-teljaran, t.e. samanbind MS-JK flip-flop rásirnar í mynd 2.1.2 við leiðarum og møguligum (um neyðugt) kombinatoriskum IC rásum (AND, OR og NOT).

At svara í starvstovuni:
Spurningur 4: Set teljararásina upp í starvsstovuni og royn teljaran við at geva honum (klokku-) pulsir inn og hyggja at Q_1 Q_0 við ljósdiodum ella oscilloscopinum.



Mynd 2.1.2 Tveir MS-JK flip-flop'ar
at binda saman til ein trýteljara.

Q(n)	Q(n+1)	J(n)	K(n)
0	0		
0	1		
1	0		
1	1		

Talva 1.Umvend sannleikatalva
(til at fylla út)

Ck(n)	Q_1	Q_0	J_1	K_1	J_0	K_0
0	0	0				
1	0	1				
2	1	0				
3	0	0				
4	0	1				
5	1	0				

Talva 2 Sannleikatalva fyri trýteljara.
(til at fylla út)



Mynd 2.1.3 Tíðarskifti fyri trýteljara
(til at fylla út)

2.2 Binerur 8 bit teljari

Ein 8 bit binerur teljari (256-teljari) verður uppbygdur við brúk av einari 74LS393 IC-teljararás, sum víst er í Mynd 2.2.1. Í 74LS393–rásini eru tveir 4 bit teljarar.

At svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni:
Spurningur 5: Tekna eina streymrás (diagramm) fyri 256-teljaran, t.e. samanbind teljararásirnar í mynd 2.2.1 við leiðarum, og vís, hvussu spenningar verða settir til, og hvussu útlesing fer fram.

At svara í starvsstovuni:

Spurningur 6: Set 256-teljararásina upp í starvsstovuni og royn teljaran við at geva honum (klokku-) pulsir inn og hyggja at útgangsbittunum við ljósdiodum og oscilloscopinum.



Mynd 2.2.1 Tveir binerir teljarar í einari IC-rás 74LS393. Partur av datablaði.

2.3 Digital – analog umsetari

Í uppbyggingini av digitalvoltmetrinum, sum í veruleikanum er ein analog-digital umsetari, verður ein digital-analog umsetari brúktur. Hesin verður konstrueraður við brúk av eini digital-analog umsetara IC-rás DAC0808 (8 bit), ið gevur ein streym i_a á útganginum, ið er proportionalur við digitalvirðið á teimum 8 innkomandi bittunum, og einum operatións-styrkjara, t.d. LM741 (u741), ið ger ein útgangsspenning V, sum er proportionalur við hendan streymin. Datablað fyri DAC0808 er partvís víst í mynd 2.3.1, og fyri u741 í mynd 2.3.2.



Mynd 2.3.1 D/A umsetari DAC0808.
Partur av datablaði.



Mynd 2.3.2 Operatiónsstyrkjari LM741 (u741).
Partur av datablaði.

Í mynd 2.3.3 er ein streymrás sett upp fyri ein digital-analog umsetara, sum hevur spenningin V á útganginum, ið er proportionalur við streymin i_a og harvið eisini við binera talið $0.Q_7\ Q_6\ Q_5\ Q_4\ Q_3\ Q_2\ Q_1\ Q_0$. (Her eru bittini nevnd Q, meðan í datablaðnum stendur A.)

Fyri DAC0808-rásina er givið, at streymurin

$$i_a = i_r\ [\ ½\ Q_7 + (½)^2\ Q_6 + (½)^3\ Q_5 + (½)^4\ Q_4 + (½)^5 Q_3 + (½)^6\ Q_2 + (½)^7\ Q_1 + (½)^8 Q_0],$$

har i_r er referensustreymurin sum kemur inn í refensuinngangin (bein 14) á DAC0808.



Mynd 2.3.3

Referensuinngangurin "V_{ref} " (bein 14) hevur ein sera lítlan inngangsmótstand, ella vit kunnu siga, at hann er "virtuelt nul". Hetta merkir, at I_{ref} verður avgjørdur av tí ytru streymrásini, ið er samansett av eini zenerdiodu, ið skapar ein næstan konstantan spenning, og tveimum mótstøðum R_Z og R_{ref}.

Operatiónsstyrkjarin virkar sum ein transresistanskoblaður styrkjari, ið ger ein spenning á útganginum V, sum er proportionalur við I_a . Kondensatorarnir 10 nF og C hava onga beinleiðis ávirkan á úrslitið og eru við í rásini bert fyri at sleppa undan sjálvsvingi í rásini. Tí er valið av teimum eisini ókritiskt.

At svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni:
Spurningur 7: Referensustreymurin I_{ref} =2 mA er ein passandi støddsambært datablaðnum. Zenerspenningurin V_Z = 6 volt, og streymurin gjøgnum zenerdioduna er settur at vera 10 I_Z fyri at stabilisera spenningin. Hvussu stórir eru R_Z og R_{ref} .

Spurningur 8: Hvussu stór er mótstøðan R fyri, at útgangsspenningurin í mesta lagi skal vera 10 volt.

At svara í starvsstovuni:
Spurningur 9: Set digital-analog umsetaran upp (tað er møguligt, at zenerspenningurin ikke er neyvt 6 volt. Í so fall skal R-virðið, sum gevur júst 10 volt út, svarandi til aktuella

zenerspenningin finnast í starvsstovuni, meðan R_Z og R_{ref} hava óbroytt virði). Royn við givnum valdum bit virðum fyri Q_7 Q_6 Q_5 Q_4 Q_3 Q_2 Q_1 Q_0 á inngangunum um tilsvarandi spenningur V er á útganginum á D/A umsetaranum.

2.4 Rampu-trapputrinsspenningsgerði, samansettur av teljara og D/A umsetara

Vit kunnu nú sum víst í mynd 2.4.1 seta útgangsbittini á teljaranum til tilsvarandi inngangsbit í D-A umseraranum og lata teljanan telja frá 0 til 255. Útgangssignalið verður tá ein vaksandi spenningur, sum í trapputrinum veksur frá 0 til 10 volt.



Mynd 2.4.1

At svara í starvsstovuni:

Spurningur 10: Set rampu-trappuspenningsgerðan saman av 8-bit teljaranum og D/A umsetaranum. Máta V sum funktión av tíðini við oscilloscopinum. Tekna úrslitið upp.

Spurningur 11: Set eina talvu upp, har spenningurin verður uppgivin fyri hvørt av digitalvirðunum á Q-útgongdunum (øll 256 virðini eru ikki neyðug, men uppgev 10 tey fyrstu og 5 tey seinastu virðini). Máta støddina av trapputrinunum, og samanber við, hvat tað teoretiskt skal vera.

2.5 Spenningssamanberari (comparator) og digitalvoltmetur uttan funktiónsskiftara

Vit hava higartil sæð, hvussu ein teljari fær ein spenning at vaksa frá nul til 10 volt. Vit skulu nú gera tann partin av eini stýriskipan, sum ger samlaðu skipanina soleiðis skikkaða, at hon fær teljarin at steðga, tá útgangsspenningurin V er komin upp til virði hjá tí ókenda spenninginum V_X , ið endamálið við einum digitalvoltmetri er at máta. Hetta merkir, at útgangsvirði av tí 8 bit binera talinum, sum teljarin vísir júst er eitt mát fyri tí ókenda spenninginum V_X. Hetta verður gjørt við einum komparatori, ið verður bygdur upp sum myndin 2.5.1 vísur við einum operatiónsstyrkjara einari Zenerdiodu og einari "AND-gate".



Mynd 2.5.1

At svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni:
Spurningur 12: Hvussu stórur skal zenerspenningurin hjá dioduni vera. Áset eitt hóskandi virði fyri mótstøðuna R í komparatorinum.

At svara í starvsstovuni:
Spurningur 13: Set komparatoruppsetingina upp í starvsstovuni og royn við ymsum spenningum á inngonginum um tilsvarandi biner digitalvirði koma á Q-útgangirnar.

2.6 Funktiónsskiftaraskipan

Tað seinasta stigið at uppbyggja voltmetrið er samanbindingin av trýteljaranum gjøgnum stýriskipanina til digitalvoltmetrið. Stýriskipanin er uppbygd av kombinatoriskum rásum. Krøvini til stýriskipanina eru hesi:

Støða 1: Voltmetrið er nulstillað, tá Q_1 $/Q_1$ Q_0 $/Q_0 = 0101$.
Hesi virði skulu stýra voltmetrinum, soleiðis at útgangurin á 8 bit teljaranum er 00000000, ella við øðrum orðum, teljarin verður nulstillaður.

Støða 2: Voltmetrið mátar ein spenning, tá Q_1 $/Q_1$ Q_0 $/Q_0 = 0110$.
Hesi virði stýra voltmetrinum soleiðis, at 8 bit teljarin ikki er nulstillaður, og at klokkupulsarnir koma ígjøgnum til teljaran, inntil komparatorsignalið, tá tað fær virðið 0, í hesi støðu avgerð, at klokkusignalið ikki longur kemur til teljarin.

Støða 3: Voltmetrið verður roynt svarandi til fullan spenning.
Hetta ber við sær, at Q_1 $/Q_1$ Q_0 $/Q_0 = 1001$, og skulu hesi virði stýra voltmetrinum soleiðis, at teljarin telur í hesum føri til útgangurin á 8 bit teljaranum er 11111111. Útgangssignalið á hesum

teljaranum skal so fáa teljaran at steðga, t.e. forða klokkusignalinum, at koma til inngangin á teljaranum.

Hetta verður gjørt við rásini sum víst í mynd 2.6.1.



Mynd 2.6.1

At svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni í starvsstovuni:
Spurningur 14: Vís hvussu stýriskipanin kann verða uppbygd av t.d. tveimum "NAND-gate"um og einari "AND-gate" (onkur av teimum hevur eitt stórt tal av inngangum).

At svara í starvsstovuni:
Spurningur 15: Set stýriskipanina upp soleiðis, at tær trýggjar støðurnar virka.

2.7 Digitalvoltmetur við funktiónsskiftaraskipan til spenningsmáting, 0-stilling og 1-stilling av digitalútganginum.

Samlaða digitalvoltmeturskipanin verður nú roynd

At svara í starvsstovuni:
Spurningur 16: Máta í støðu 1 spenningin V og støðuna á ljósdiodunum fyri V_X = 0, 2, og 5 volt.

Spurningur 17: Máta í støðu 2 spenningin V og støðuna á ljósdiodunum fyri V_X = 0, 2, og 5 volt.

Spurningur 18: Máta í støðu 3 spenningin V og støðuna á ljósdiodunum fyri V_X = 0, 2, og 5 volt.

3. Starvsstovuútgerð

Til venjingina er henda starvstovuútgerð tøk:

- Digitalur royndarbonkur við innbygdum 5 volt spenningsgerða, klokkuspennings-gerða, digitalum 0/1-signal kontaktum, ljósdiodum til lesing av digitalsignalum, og haldarum til IC rásir ("Integrated Circuit chips").
- Ossilloskop við tveimum signalrásum
- Spenningsgerði við broytiligum spenningi
- Voltmetur (multimetur)
- Funktiónsspenningsgerði við sinus, trýkant og fýrkantspenningi við broytiligum frekvensi og amplitudu
- Tær IC rásir og mótstøður og kondensatorar, ið eru kravdar til venjingina
- Databløð og bøkur til IC rásirnar.

IV. CMI – KODING TIL LJÓSLEIÐARA DATASENDISKIPAN
STARVSTOVUVENJING

1. Inngangur
Venjingin snýr seg um greining av uppbygging og virkihátti í eini kodingsskipan, ið m.a. verður brúkt í optiskum transmissiónsskipanum. Skipanin er uppbygd av undireindum, sum hvør sær fyrst verður uppbygd og kannað. Síðan verða tær bundnar saman til eina samanhangandi transmissiónsskipan, hvørs transmissiónseginleikar verða kannaðir.

2. Kodiskipan - endamál og uppbyggjan
Í øllum digitalum tele- og datatransmissiónsskipanum, verða kodingsskipanir nýttar til tess at gera transmissiónina av information tryggast og best møguliga. Vanliga, tá information skal verða borin frá einum staði til annað, verður hetta gjørt við, at informatiónin verður gjørd um til eitt digitalt signal, ið kann vera binert, t.e. ein røð av "0"-um og "1"-um, sum verða send hvørt aftan á annað, t.e. sekventielt (serielt), á eini transmissiónslinju.

Verður soleiðis tann bineri framburðurin (representatiónin) av signalinum nýttur, býta vit tíðarásin upp í interval av ávísari longd T=1/f, har f verður nevndur klokkufrekvensurin. Í hvørjum av hesum intervallum senda vit eitt signalmynstur (spenningsmynstur), ið er ymiskt fyri "0" og "1", og sigur frá, hvørt av hesum verður sent. Hetta spenningsmynstur nevna vit eina kodu fyri transmissiónina.

Ein tann mest einfalda, og vit kunnu kanska siga grundleggjandi, kodingin er myndað av, at spenningurin í intervallinum er 0 volt svarandi til logiskt "0" og V volt svarandi til logiskt "1". Hesa koduna nevna vit ta bineru "unipolaru NRZ" koduna ("Non Return to Zero"). NRZ er víst í mynd 2.1 saman við øðrum kodum. Er spenningurin V volt bert helvtina av einum 1-intervalli verður kodan nevnd "unipolar RZ" ("Return to Zero").

Er logiskt "0" myndað av spenninginum –V/2, og "1" myndað av +V/2 , fáa vit tær tilsvarandi bipolaru ella bert polaru kodurnar.

Tað er ikki altíð, at transmissiónskodurnar eru so einfaldar við tað, at tað oftast er ynskt, at tær skulu uppfylla ymsar treytir fyri, at transmissiónin skal gerast so trygg og feilfrí sum gjørligt. Eginleikar í transmissiónini, ið hædd skal takast fyri, kunnu vera av ymiskum slag. Í koparkaðalum er soleiðis ynskt, at miðalvirðið av signalspenninginum skal vera so nær null, sum gjørligt er, av tí at transmissión av einum javnstreymi onga nyttu ger, men bert elvir til eitt orkutap. Tí er ynskt í hesum kaðalum, at tað kodaða signalið verður borið av einum spenningi, ið í meðal er null, t.e. eins ofta er positivur sum negativur. Tí verða polarar kodur valdar til hesa transmissión. Í glasfipurkaðalum er hetta ikki nakar trupulleiki við tað, at signalið her er ljós. Harafturímóti er í øllum digitalum transmissiónsskipanum avgerandi, at tað í móttøkuendanum er møguligt at fáa fatur í einum klokkusignali, ið ger tað møguligt at



Mynd 2.1

markera, nær tey digitalu signalmynstrini skulu verða avlisin. Hetta klokkusignalið kann sjálvsagt verða sent í serstakari sendikanal, men er tað ein dýrur máti, sum tí ikki verður nýttur.

Í veruligum kommunikatiónsskipanum verður klokkusignalið endurskapt úr sjálvum informatiónssignalinum, sum inniheldur ein frekvenskomposant (Fourier komposant) við sama frekvensi, sum klokkusignalið hevur, ella eitt heiltals multiplum av honum. Fyri at tryggja, at ein long røð av nullum ella eitt tølum í tí digitala signalinum ikki skal geva eitt langt tíðarbil har kaðalsignalið, tað veri seg í koparkaðali ella ljósleiðarakaðali, er konstant, og tað tí verður torført at endurskapa klokku-signalið, verður ein ella annar formur fyri koding nýttur, sum ger at signalið, sum sent verður, javnan skiftir við tíðini.

Í ljósleiðarasendiskipanum verður ofta tann sokallaða CMI kodan (coded mark inversion) brúkt. Hon fæst fram við at brúka hesar reglar (sí mynd 2.1):

- Logiskt “0” verður myndað í einum klokkuintervalli sum lágt signal í fyrru helvt av intervallinum og sum høgt signal í seinnu helvt av intervallinum, t.e. tað hendir eitt skift frá lágum til høgt signal í miðjuni av intervallinum. Vit kunnu sostatt siga at “0” verður umsett til at eita “01” við einum nýggjum klokkuintervalli, ið bert hevur hálva stødd av grundklokkuintervallinum.

- Logiskt “1” verður myndað sum eitt støðugt signal í øllum data- klokkuintervallinum. Hetta skiftir millum at vera lágt og høgt aðruhvørja ferð logiskt ”1” kemur fyri. Vit kunnu sostatt siga at “1” er umsett til “00” ella “11” aðruhvørja ferð tað fyrikemur.

Tí er brúk fyri at gera eitt klokkusignal við dupultum klokkufrekvensi til tess at stýra CMI koduni. Hesa klokku nevna vit CMI-klokkuna.

Í venjingini verður ein CMI kodari og ein CMI dekodari, hóskandi til brúk í einari ljósleiðaraskipan, uppbygdur við IC rásum og royndur. Av tí at tað her snýr seg um at modulera signalið til eina ljósstrálu frá einum lasara, t.e. sløkkja og tendra hann, brúka vit lágan og høgan spenning frá IC rásunum til at mynda lágt og høgt niveau í CMI koduni, sum víst í mynd 2.1

Til tess at royna skipanina er brúk fyri einum digitalum inngangssignali, ið er eitt tilvildarligt býti av "0" og "1" á tíðarásinum. Best hevði verið at havt ein tilvildarligan orðgerða ella bitgerða til hetta endamál; men til hesa venjingina byggja vit ein orðgerða við einum føstum 8 ella 16 bit orði, ið verður endurtikið periodiskt, og sum vit kunnu stilla eftir ynski.

Yvirlitsuppsetingin av skipanini sær út sum víst í mynd 2.2. Úr orðgerðanum kemur ein røð av bittum í NRZ kodu, sum verður umgjørdur til CMI kodu í CMI-kodaranum. Hetta CMI signalið er tað signalið, ið vanliga verður sent gjøgnum ljósleiðaran, sum kortini ikki er við í hesi venjingini. Í móttøkuendanum verður CMI signalið móttikið aftur, og síðan umger CMI-dekodarin hesa koduna aftur til NRZ kodu.



Mynd 2.2

3. Klokkur

Dataklokkan er grundklokkusignalið, ið stýrir datasignalinum. Síðan hava vit eisini brúk fyri einum CMI-klokkusignali við dupult so stórum frekvensi, sum dataklokkan hevur. Eitt slíkt signal kann verða gjørt við ólineerum elektronikki og liggur uttan fyri evni í hesi venjingini. Vit skulu heldur ganga hinvegin og byrja við eini CMI-klokku. Við eini flip-flop IC-rás skapa vit eitt dataklokkusignal við hálvum CMI-klokku frekvensi. Vit velja ein D flip-flop 74LS74(mynd 3.1).

At svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni:
Spurningur 1: Ger eitt diagramm av klokkusignalgerðanum og vís, hvar dataklokka og CMI-klokka eru.

At svara í starvsstovuni:
Spurningur 2: Bygg klokkusignalgerðan upp og royn hann.



D	Q	/Q
0	0	1
1	1	0

Mynd 3.1

4. Orðgerði

Í hesi venjing hevði verið best at brúkt ein orðgerða, ið ger tilvildarlig orð, til at royna CMI kodaran og dekodaran við. Hann er ikki tøkur. Í staðin fyri vilja vit byggja ein orðgerða, ið kann gera eina fyriskrivaða røð av bittum, ið síðan verður endurtikin periodiskt. Í byrjanini velja vit 8 bit, sum so eitt í senn við hjálp av einum multipleksara 74LS151 verða send út á útgangin Y. Adressuinngangirnir ABC fáa signal frá binera teljaranum 74LS393 sum víst á mynd 4.1. Orðið, ið verður sent út á Y-útganginum er D_0, D_1, D_2, D_3, D_4, D_5, D_6, D_7, ið er sett til logiskt ”0” ella logiskt ”1”, svarandi til orðið, ið vit ynskja.

At svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni:
Spurningur 3: Hvussu kunnu vit broyta orðgerðan við at brúka enable inngangin á multipleksaranum , soleiðis at 8 bit røðin, sum vit hava stillað við givnum virðum verður eftirfylgd av 8 nullum, og síðan endurtikið periodiskt.

At svara í starvsstovuni:
Spurningur 4: Set 8 bit orðgerðan upp. Ger broytingina sambært sp.3. Royn orðgerðan, áðrenn og aftan á broytingina.



Mynd 4.1

5. CMI-kodari

Sum tað gongur fram av frágreiðingini í parti 2 og mynd 5.1, ger CMI kodarin brúk av einum klokkufrekvensi, sum er dupult so stórur sum dataklokkufrekvensurin.

Nú er so spurningurin, hvørjir inngangsvariablar stýra, hvørjum virði 0 ella 1, ið CMI útgangurin skal hava í hvørjum CMI-klokkuintervalli.

Givið er, at datasignalið, ið vit nevna DATA, má vera inngangsvariabul. Vit síggja eisini, at CMI signalið, svarandi til DATA = 0, skiftir í miðjum intervalli. Hetta ger dataklokkan eisini. Tí má dataklokkusignalið “DKL” vera ein hóskandi inngangsvariabul.



Mynd 5.1

CMI signalið svarandi til DATA=1 er konstant í tveimum CMI-klokkuintervallum, men skiftir virði til 0 og 1 aðruhvørja ferð 2 CMI klokkusignal hava verið. Tí mugu vit hava ein variabul, lat okkum nevna hann LEVEL, sum stýrir CMI signalvirðinum í "1" intervallum, og skiftir virði hvørja ferð eitt DATA=1 kemur inn, men heldur virði tá DATA=0. Level er hinvegin ikki eitt útifrá komandi signal, men má verða gjørt í skipanini. Av tí at LEVEL bert broytist, tá DATA hevur verið tvær ferðir 1, tá ein CMI klokkupulsur kom, má tann digitala maskinan, sum skapar LEVEL hava 4 støður svarandi til 2 støðuvariablar (2 flip-flop).

At svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni:
Spurningur 5: Vís, at útgangssignalið CMI = DATA'•DATAKL' + DATA•LEVEL
(• er brúkt fyri "AND"). Allar støður eru vístar á mynd 5.1.

Spurningur 6: Vís, at tann við CMI- klokkuna synkrona digitala maskinan í mynd 5.2 gevur LEVEL signalið. Hetta verður gjørt við at

- finna excitatiónslíkningarnar
- skriva yvirgangs/útgangstalvu upp
- skriva støðu/útgangstalvu upp
- definera støðurnar
- tekna støðudiagramm
- vís á hvar í mynd 5.2 LEVEL signalið er.

Spurningur 7: Vís, at ein digital maskina við bert einum D flip-flop, ið er synkron við dataklokkuna DKL eisini kann geva LEVEL signalið. Konstruera hesa maskinuna við at

- definera støðurnar
- tekna støðudiagramm
- skriva støðu/útgangstalvu upp
- skriva yvirgangs/útgangstalvu upp
- finna excitatiónslíkningarnar
- tekna rásina (diagrammið) upp.

At svara í starvsstovuni:
Spurningur 8: Bygg CMI kodaran við at brúka aðra av loysnunum frá sp.6 ella 7.



Mynd 5.2 CMI – kodari

6. CMI - dekodari

Ein dekodari er ein digital maskina, sum broytir CMI koduna til eitt datasignal (tað upprunaliga) við NRZ kodu sambært

CMI koda	DATA (NRZ-koda)
01	00
00	11
11	11

Í venjingini ganga vit út frá aðrari av teimum givnu rásunum fyri ein CMI dekodara, sum mynd 6.1 ella mynd 6.2 vísir (uppseting í mynd 6.2 er lættari at fáa at virka).



Mynd 6.1 CMI – dekodari, bygdur við flip-floppum



Mynd 6.2 CMI – dekodari bygdur við skiftiregisturi

At svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni, svarandi til mynd 6.1:

Spurningur 9: Finn exitatiónslíkningarnar.

Spurningur 10: Finn yvirgangslíkningarnar (transitiónslíkningarnar) fyri flip-flopparnar.

Spurningur 11: Skriva yvirgangstalvuna (transitiónstalvuna) upp.

Spurningur 12: Navngev støðurnar, og skriva støðutalvuna upp.

Spurningur 13: Tekna støðudiagramm.

Spurningur 14: Tekna eina tíðarmynd, har CMI datasignal og datasignal, og eitt passandi tal av millumsignalum eru tikin við.

Spurningur 15: Vís, at fyri at fáa hesa uppseting at virka krevst synkronisering av dekodaranum til røttu hálvperioduna av dataintervallinum.

At svara áðrenn møtt verður í starvsstovuni, svarandi til mynd 6.2:
Spurningur 16: Skriva sannleikatalvuna upp fyri kombinatorisku rásina DATAinn sum funktión av QA,QB,QC,QD og QE útgangirnar í skiftiregistrinum svarandi til CMI dekoding. Vís at hendan funktiónin kann realiserast við vístu logisku rásini. Vís at útgangsvirði DATA á CMI dekodaranum eru somu data sum inngangsvirði DATA í CMI kodaran.

At svara í starvsstovuni:
Spurningur 17: Set rásina av CMI dekodaranum saman sum í mynd 6.1 ella mynd 6.2 , og royn hana.

7. CMI kodara – dekodara skipan

At svara í starvsstovuni:
Spurningur 18: Fyri at kunna fáa CMI kodara og CMI dekodara at arbeiða saman, er neyðugt at gera eitt synkroniseningssignal sum nulstillar teir samstundis, t.d. tá teljarin, ið stýrir bitsekvensinum hevur útgangin 1111. Ger hesa rásina, um uppsetingin í mynd 6.1 verður brúkt. Synkronisering er ikki neyðug til rásini í mynd 6.2.

Spurningur 19: Samanbind allar lutskipaninar og royn samlaðu skipanina við at samanbera bitsamansetingina frá orðgerðanum, og tað CMI dekodaranum gjørda signalið.

Spurningur 20: Hví skulu D-flip-floppar vera settir í útgangin av CMI kodaranum og í útgangin av CMI dekodaranum í mynd 6.2.

8. Fyrireiking

Áðrenn venjingina verður umframt hesa leiðbeining lisið í lærubókini av J.F.Wakerly:"Digital Design, Principles and practices":

- 5.6 Multiplexers
- 7.3 Clocked synchronous state-machine analysis
- 7.4 Clocked synchronous state-machine design
- 8.4 Counters
- 8.5 Shift registers

9. Starvsstovuútgerð

Til venjingina er henda starvstovuútgerð tøk:

- Digitalur royndarbonkur við innbygdum 5 volt spenningsgerða, klokkuspennings-gerða, digitalum 0/1-signal kontaktum, ljósdiodum til lesing av digitalsignalum, og haldarum til IC rásir ("Integrated Circuit chips").
- Monteringspláta ("breadboard") til montering av komponentum
- Oscilloskop við tveimum signalrásum
- Voltmetur (multimetur)
- Funktiónsspenningsgerði við sinus, trýkant og fýrkantspenningi við broytiligum frekvensi og amplitudu
- Tær IC rásir og aðrir komponentar, ið eru kravd til venjingina
- Databløð og bøkur til IC rásirnar.

V. Databløð (úrtøk)

5400/DM5400/DM7400 Quad 2-Input NAND Gates

National Semiconductor

June 1989

5400/DM5400/DM7400
Quad 2-Input NAND Gates

General Description

This device contains four independent gates each of which performs the logic NAND function.

Features

- Alternate Military/Aerospace device (5400) is available. Contact a National Semiconductor Sales Office/Distributor for specifications.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



TL/F/6613–1

Order Number 5400DMQB, 5400FMQB, DM5400J, DM5400W or DM7400N
See NS Package Number J14A, N14A or W14B

Function Table

$Y = \overline{AB}$

Inputs		Output
A	B	Y
L	L	H
L	H	H
H	L	H
H	H	L

H = High Logic Level
L = Low Logic Level

5402/DM5402/DM7402 Quad 2-Input NOR Gates

National Semiconductor

June 1989

5402/DM5402/DM7402
Quad 2-Input NOR Gates

General Description

This device contains four independent gates each of which performs the logic NOR function.

Features

- Alternate Military/Areospace device (5402) is available. Contact a National Semiconductor Sales Office/Distributor for specifications.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



TL/F/6492–1

Order Number 5402DMQB, 5402FMQB, DM5402J, DM5402W or DM7402N
See NS Package Number J14A, N14A or W14B

Function Table

$Y = \overline{A + B}$

Inputs		Output
A	B	Y
L	L	H
L	H	L
H	L	L
H	H	L

H = High Logic Level
L = Low Logic Level

DM7404 Hex Inverting Gates

FAIRCHILD SEMICONDUCTOR™

August 1986
Revised July 2001

DM7404
Hex Inverting Gates

General Description

This device contains six independent gates each of which performs the logic INVERT function.

Ordering Code:

Order Number	Package Number	Package Description
DM7404M	M14A	14-Lead Small Outline Integrated Circuit (SOIC), JEDEC MS-012, 0.150" Narrow
DM7404N	N14A	14-Lead Plastic Dual-In-Line Package (PDIP), JEDEC MS-001, 0.300" Wide

Devices also available in Tape and Reel. Specify by appending the suffix letter "X" to the ordering code.

Connection Diagram



Function Table

$Y = \overline{A}$

Inputs	Output
A	Y
L	H
H	L

H = HIGH Logic Level
L = LOW Logic Level

DM7408 Quad 2-Input AND Gates

FAIRCHILD SEMICONDUCTOR™

August 1986
Revised February 2000

DM7408
Quad 2-Input AND Gates

General Description

This device contains four independent gates each of which performs the logic AND function.

Ordering Code:

Order Number	Package Number	Package Description
DM7408N	N14A	14-Lead Plastic Dual-In-Line Package (PDIP), JEDEC MS-001, 0.300 Wide

Connection Diagram



Function Table

$Y = AB$

Inputs		Output
A	B	Y
L	L	L
L	H	L
H	L	L
H	H	H

H = HIGH Logic Level
L = LOW Logic Level

National Semiconductor

June 1989

5410/DM5410/DM7410 Triple 3-Input NAND Gates

General Description

This device contains three independent gates each of which performs the logic NAND function.

Features

- Alternate Military/Aerospace device (5410) is available. Contact a National Semiconductor Sales Office/Distributor for specifications.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



TL/F/6500–1

Order Number 5410DMQB, 5410FMQB, DM5410J, DM5410W or DM7410N
See NS Package Number J14A, N14A or W14B

Function Table

$Y = \overline{ABC}$

Inputs			Output
A	B	C	Y
X	X	L	H
X	L	X	H
L	X	X	H
H	H	H	L

H = High Logic Level
L = Low Logic Level
X = Either Low or High Logic Level

RRD-B30M105/Printed in U. S. A.

National Semiconductor

June 1989

DM5414/DM7414 Hex Inverter with Schmitt Trigger Inputs

General Description

This device contains six independent gates each of which performs the logic INVERT function. Each input has hysteresis which increases the noise immunity and transforms a slowly changing input signal to a fast changing, jitter free output.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



TL/F/6503–1

Order Number DM5414J, DM5414W or DM7414N
See NS Package Number J14A, N14A or W14B

Function Table

$Y = \overline{A}$

Input	Output
A	Y
L	H
H	L

H = High Logic Level
L = Low Logic Level

RRD-B30M105/Printed in U. S. A.

National Semiconductor

June 1989

5420/DM5420/DM7420 Dual 4-Input NAND Gates

General Description

This device contains two independent gates each of which performs the logic NAND function.

Features

- Alternate Military/Aerospace device (5420) is available. Contact a National Semiconductor Sales Office/Distributor for specifications.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



TL/F/6506–1

Order Number 5420DMQB, 5420FMQB, DM5420J, DM5420W or DM7420N
See NS Package Number J14A, N14A or W14B

Function Table

$Y = \overline{ABCD}$

Inputs				Output
A	B	C	D	Y
X	X	X	L	H
X	X	L	X	H
X	L	X	X	H
L	X	X	X	H
H	H	H	H	L

H = High Logic Level
L = Low Logic Level
X = Either Low or High Logic Level

RRD-B30M105/Printed in U. S. A.

National Semiconductor

June 1989

DM7427 Triple 3-Input NOR Gates

General Description

This device contains three independent gates each of which performs the logic NOR function.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



TL/F/6509–1

Order Number DM7427N
See NS Package Number N14A

Function Table

$Y = \overline{A + B + C}$

Inputs			Output
A	B	C	Y
L	L	L	H
X	X	H	L
X	H	X	L
H	X	X	L

H = High Logic Level
L = Low Logic Level
X = Either High or Low Logic Level

RRD-B30M105/Printed in U. S. A.

National Semiconductor

June 1989

5430/DM5430/DM7430
8-Input NAND Gate

General Description

This device contains a single gate which performs the logic NAND function.

- Alternate Military/Aerospace device (5430) is available. Contact a National Semiconductor Sales Office/Distributor for specifications.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



TL/F/6610–1

Order Number 5430DMBQ, 5430FMQB, DM5430J, DM5430W or DM7430N
See NS Package Number J14A, N14A or W14B

Function Table

$Y = \overline{ABCDEFGH}$

Inputs	Output
A thru H	Y
All Inputs H	L
One or More Input L	H

H = High Logic Level
L = Low Logic Level

RRD-B30M105/Printed in U. S. A.

National Semiconductor

June 1989

5432/DM5432/DM7432
Quad 2-Input OR Gates

General Description

This device contains four independent gates each of which performs the logic OR function.

Features

- Alternate Military/Aerospace device (5432) is available. Contact a National Semiconductor Sales Office/Distributor for specifications.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



Order Number 5432DMQB, 5432FMQB, DM5432J, DM5432W or DM7432N
See NS Package Number J14A, N14A or W14B

Function Table

$Y = A + B$

Inputs		Output
A	B	Y
L	L	L
L	H	H
H	L	H
H	H	H

H = High Logic Level
L = Low Logic Level

FAIRCHILD SEMICONDUCTOR™

September 1986
Revised July 2001

DM7474
Dual Positive-Edge-Triggered D-Type Flip-Flops with Preset, Clear and Complementary Outputs

General Description

This device contains two independent positive-edge-triggered D-type flip-flops with complementary outputs. The information on the D input is accepted by the flip-flops on the positive going edge of the clock pulse. The triggering occurs at a voltage level and is not directly related to the transition time of the rising edge of the clock. The data on the D input may be changed while the clock is LOW or HIGH without affecting the outputs as long as the data setup and hold times are not violated. A LOW logic level on the preset or clear inputs will set or reset the outputs regardless of the logic levels of the other inputs.

Ordering Code:

Order Number	Package Number	Package Description
DM7474M	M14A	14-Lead Small Outline Integrated Circuit (SOIC), JEDEC MS-012, 0.150" Narrow
DM7474N	N14A	14-Lead Plastic Dual-In-Line Package (PDIP), JEDEC MS-001, 0.300" Wide

Devices also available in Tape and Reel. Specify by appending the suffix letter "X" to the ordering code.

Connection Diagram



Function Table

Inputs				Outputs	
PR	CLR	CLK	D	Q	$\overline{Q}$
L	H	X	X	H	L
H	L	X	X	L	H
L	L	X	X	H (Note 1)	H (Note 1)
H	H	↑	H	H	L
H	H	↑	L	L	H
H	H	L	X	Q_0	$\overline{Q}_0$

H = HIGH Logic Level
X = Either LOW or HIGH Logic Level
L = LOW Logic Level
↑ = Positive-going transition of the clock.
Q_0 = The output logic level of Q before the indicated input conditions were established.

Note 1: This configuration is nonstable; that is, it will not persist when either the preset and/or clear inputs return to their inactive (HIGH) level.

 DS006526

National Semiconductor

June 1989

5476/DM5476/DM7476
Dual Master-Slave J-K Flip-Flops with Clear, Preset, and Complementary Outputs

General Description

This device contains two independent positive pulse triggered J-K flip-flops with complementary outputs. The J and K data is processed by the flip-flop after a complete clock pulse. While the clock is low the slave is isolated from the master. On the positive transition of the clock, the data from the J and K inputs is transferred to the master. While the clock is high the J and K inputs are disabled. On the negative transition of the clock, the data from the master is transferred to the slave. The logic state of J and K inputs must not be allowed to change while the clock is high. The data is transfered to the outputs on the falling edge of the clock pulse. A low logic level on the preset or clear inputs will set or reset the outputs regardless of the logic levels of the other inputs.

Features

- Alternate Military/Aerospace device (5476) is available. Contact a National Semiconductor Sales Office/Distributor for specifications.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



TL/F/6528–1

Order Number 5476DMQB, 5476FMQB,
DM5476J, DM5476W or DM7476N
See NS Package Number J16A, N16E or W16A

Function Table

Inputs					Outputs	
PR	CLR	CLK	J	K	Q	$\overline{Q}$
L	H	X	X	X	H	L
H	L	X	X	X	L	H
L	L	X	X	X	H*	H*
H	H	⊓⊔	L	L	Q_0	$\overline{Q}_0$
H	H	⊓⊔	H	L	H	L
H	H	⊓⊔	L	H	L	H
H	H	⊓⊔	H	H	Toggle	

H = High Logic Level
L = Low Logic Level
X = Either Low or High Logic Level
⊓⊔ = Positive pulse data. The J and K inputs must be held constant while the clock is high. Data is transfered to the outputs on the falling edge of the clock pulse.
* = This configuration is nonstable; that is, it will not persist when the preset and/or clear inputs return to their inactive (high) level.
Q_0 = The output logic level before the indicated input conditions were established.
Toggle = Each output changes to the complement of its previous level on each complete active high level clock pulse.

RRD-B30M105/Printed in U. S. A.

National Semiconductor

June 1989

5486/DM5486/DM7486
Quad 2-Input Exclusive-OR Gates

General Description

This device contains four independent gates each of which performs the logic exclusive-OR function.

Features

- Alternate Military/Aerospace device (5486) is available. Contact a National Semiconductor Sales Office/Distributor for specifications.

Connection Diagram

Dual-In-Line Package



TL/F/6531–1

